HOYVÍKSHØLLIN
DYSTARSKRÁ 3 / 2022

H71

SUNNUDAGUR
13. FEBRUAR

sms
SUÐUROYAR SPARIKASSI
J&K
WENZEL.FO
BONUS
INTERSPORT
BYGMA BALSLEV
TRYGD
ADVOKATFELAGIÐ

Spennandi at vera H71-ari!

At vera partur av hondbóltsfelagsskapinum í Hoyvík er nakað serligt, men júst nú er tað næstan meira enn tað, tí tað er so hendingarríkt fyri tíðina. Ikki minst er hetta tíðin á árinum, tá ið funnið verður útav, hvørji lið koma í steypafinalurnar, og vit eru sjálvandi eisini spent, hvussu tað fer at hilnast hjá H71 hesaferð.

Í vikuni megnaði kvinnurnar hjá okkum at spæla seg í steypafinaluna, og armarnir eru nóg illa komnir niðuraftur, so skulu tær spæla fyrru fjórðingsfinaluna í EHF Europa Cup-kappingini yviri í Ukraina ímóti oddaliðnum har, HC Galychanka Lviv. Ein stór og spennandi avbjóðing, ið vit gleða okkum til, og higartil hava kvinnurnar givið okkum so mong og stór upplivilsi, at hesum veturin seint verður gloymdur!

Og so eru vit eisini spent eftir at vita, um ikki menninir eisini fara at vinna sær finalusess, nú seinni dysturin ímóti VÍF er á skránni. Fyrra hálvfinalan í Vestmanna gekk okkara veg, so tað endaði við níggju málum á muni, so útgangsstøðið er í øllum førum avbera gott undan seinnu hálvfinaluni á heimavølli.

H71 NEVND

Anna Dam, forkvinna
tel 519082 - annadam@bvs.fo

Eyðun Joensen
tel 792640 - eyjo@taks.fo

Ann-Mari B. Mouritsen
tel 214452 - ann-mari@olivant.fo

Emy Sólvitsdóttir
tel 513769 - emys@olivant.fo

Sonja Mørkøre
tel 223663 - sonjamorkore@gmail.com

Ivan Fossabrúgv
tel 239611 - ifossabrugv@gmail.com

Rene Dahl Olesen
tel 235930 - renedahlolesen@gmail.com

Annika á Steig Egholm
tel 591319 - annikasteig@hotmail.com

Símun Poulsen
tel 517220 - simun@vh.fo

Eisini fylgja vit spent við, hvussu tað gongur øllum hinum liðunum hjá H71, ið hava lagt nógv fyri og spílað seg nógv út, so tey skulu røkka sínum málum og fáa tey úrslit, tey ynskja sær. At koma í steypafinaluna er hjá øllum eitt tað størsta, tú kanst uppliva alt kappingarárið, so vit vóna, at tað aftur í ár fer at hepnast so mongum okkara liðum sum gjørligt at fara allan vegin.

Mynd: Álvur Haraldsen

Anna Dam
forkvinna í H71

Mynd: Jens á Skipagøtu

STEYPAKAPPINGAR Í HÆDDINI

(Savnsmynd: Jan Sørensen)

Hóast menninir vunnu fyrru hálvfinaluna í Vestmanna sannførandi við níggju mál, má arbeiðið gerast liðugt í dag, uttan nakran slingur í valsinum

Sum vant verða steypakappingarnar í hondbólti spældar nú fyrst í árinum. Bólkaspølini eru lokin og tær seinastu hálvfinalurnar verða nú avgreiddar. Bæði fremsta kvinnu- og manslið okkara komu í hálvfinalurnar. Kvinnurnar hava longu spælt báðar sínar ímóti Neistanum. Eftir at hava vunnið eina sannførandi fyrru hálvfinalu við heili átta málum, taptu tær tepurt ta seinnu við einum máli í Hoyvíkshøllini mikukvøldið, og eru soleiðis klárar til finaluna.
Menninir spæla hálvfinalu sína ímóti VÍF og eisini teir vunnu fyrru hálvfinaluna sannførandi við heili 9 málum í Vestmanna síðsta sunnudag. Tað skal vilja illa til, um teir ikki greiða setningin og vinna seinnu hálvfinaluna, so teir koma í finaluna. Men – eins og í politikki – er einki liðugt fyrr enn alt er liðugt, so vit mugu á ongan hátt taka dystin ímóti VÍF sum eitt "walk over", tí tá kann lættliga enda galið

Púra óávirkaðar

Í ár er tó enn ein steypakapping, har H71 er við, og er tað EHF Europa Cup-kappingin hjá kvinnum, har H71 á ófatiligan hátt hevur spælt seg fram til fjórðingsfinalurnar. Mótstøðuliðið er hesaferð ukrainska meistaraliðið, HC Galychanuka Lviv, úr landslutinum Lviv Oblast eystast við markið til

Poland. Fyrra fjórðingsfinalan verður nú sunnudagin á útivølli í Lviv Oblast. Í skrivandi stund er ferðalagið ávegis eystur til Ukraina, og er tað við ikki sørt av bivan, at vit senda kvinnum okkara øll góðynski, nú áðrenn farið verður undir størstu uppgávu nakrantíð hjá einum føroyskum bóltliði.
Sum so mong onnur hevur leikarafaldarin eisini haft høvi til at fylgja menningini hjá hesum lokomotivi okkara innan kvinnuhondbólt í Føroyum.
Ferð eftir ferð hava tær vístur, at einki bítur á tær, veri seg stór og sterk mótstøða á leikvøllum ella ófantalig álop á Facebook, so satt at siga, er tað ikki sørt at ein situr við eini kenslu av, at tað ikki er ómøguligt hjá teimum at fáa eitt gott úrslit burtur úr dystinum í Ukraina sunnudagin.
Líkamikið hvat hevur verið fyri frammman higartil í hondbóltskappingunum í ár, so hava tær óávirkaðar spælt sítt spæl á ein so leikandi lættan og djúpt sannførandi hátt, at ein kann ikki hava annað enn tiltrúgv til, at tær fara at gera tað gott ímóti ukrainsku mótstøðuni sunnudagin.

Langt fram á leið

At sita her ein fríggjadag og festa á blað leikskránna hjá liðum okkara fyri vikuskiftið, har kvinnurnar hava vunnið seg í steypafinaluna í heimligu steypakappingini, menninir hava annað beinið í heimligu steypafinaluni og kvinnurnar haraftrat skulu spæla fjórðingsfinalu í EHF Europa Cup-kappingini í Ukraina, so kann ikki sannast annað, enn at hondbóltskatedralurin í Hoyvíkshøllini hevur flutt H71 langt fram á leið síðani trilvandi byrjan okkara sum hondbóltsfelag miðskeiðis í sjeytiárunum.
Koyr á, H71 – burturi og heima!

Mynd: Aleksandar Djorovic / portal.fo


WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
WENZEL.FO

TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SAMRØÐA VIÐ INGA OLSEN

SPÆLA NÚ SJEYNDA EUROPA CUP-DYSTIN!

HILMAR JAN HANSEN

(Mynd: Álvur Haraldsen)

Aftur hesaferð hava venjararnir, Ingi Olsen og Mark Lausen-Marcher, gjørt miðvísar fyrireikingar undan útidystinum ímóti ukrainska HC Galychanka Lviv, og Ingi Olsen sigur seg hava somu góðu vónir, ið hann hevur havt til undanfarnu dystir

– Vit hava hugt at nøkrum mynstrum, ið mótstøðuliðið hevur, tí tað er við hesum liðnum sum við øllum øðrum, at øll koyra eftir einum ella øðrum mynstri. Tað gera vit eisini, og í sambandi við seinnu hálvfinaluna ímóti Neistanum fingu vit roynt okkurt, vit kunnu vænta okkum frá ukrainska liðnum.

Tað sigur annar av venjarunum hjá H71-kvinnunum, Ingi Olsen, nú hann og Mark Lausen-Marcher hava fyrireikað seg og liðið til sjeynda EHF Europa Cup-dystin á hesum sinni!

– Nøkur av teimum tingunum, Galychanka ger, líkjast nøkrum av tí, Neistini eisini ger, so tí brúktu vit dystin ímóti Neistanum til at royna, hvussu vit kundu spæla upp ímóti tí. Vit hava ikki so nógva tíð til fyrireiking hesaferð, at vit valdu at brúka tann dystin sum part av fyrireikingini, sigur hann.

– Vit hava gjøgnumgingið fleiri dystir hjá Galychanka, sum vit hava funnið á netinum, og tí kundu vit royna ymiskt av tí í bæði verju og álopi, sum vit vænta at fáa brúk fyri sunnudagin.

Ingi Olsen sigur, at ukrainska liðið spældir við eini ágangandi verju, ið samstundis er nokk so álopshugað, og tað merkir so eisini, at tá ið tær koma so langt út, skapar tað pláss til hinar spælararnar.

– Hetta mugu vit so royna at gera okkum dælt av, samstundis sum vit

Framhald á s.10

AnnaJanni

FOKUS

18:29

Lætt og stuttligt

Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

mugu vera til reiðar at koma øgiliga skjótt upp á pláss aftur eftir endað álop, tí hinar koyra á við fullari ferð allan dystin. Vit mugu stand rætt og ikki gera ov nógvar feilir, so vit vóna sjálvandi, at okkara kvinnur í tí førinum megna tað sama, sum tær hava undanfarnu dystir.
Í løtuni er HC Galychanka Lviv klárt á odda av teimum seks liðunum í ukrainsku kappingini við 40 stigum fyri 20 dystir – sum er fult stigatal – og níggju stig eru niður til næstfremsta liðið.

Deila arbeiðið millum sín

Júst hetta við tíðini hevur sína ávirkan á fyrireikingarnar, tí tað hava verið so nógvir aðrir dystir, liðið eisini hevur fyrireikað seg til í heimligu kappingini, at tað hava ikki verið stundir til so nógva miðvísa venjing undan fyrru fjórðingsfinaluni ímóti Galychanka, sum verður á útivølli nú sunnudagin.
– Sjálvandi royna vit at lesa uppá og mugu royna at minnast til, hvat vit hava sæð og avtalað, og tað merkti eisini seinastu venjingina hjá okkum, áðrenn vit fóru avstað fríggjamorgunin. Tá hugdu vit at upptøkum av mótstøðuliðnum og royndu síðani ymiskt av tí, vit skuldu ansa eftir og geva okkum far um, sigur Ingi.
– Spælararnir hava í allan vetur verið øgiliga ídnir og hugaðir, og tað hevur gjøgnumgangandi gingið væl at halda avtalurnar í europeisku dystunum. Men vit kunnu heldur ikki fylla høvdið á teimum við øllum hugsandi upplýsingum, so hesaferð hava vit avmarkað ta vitanina nokk so fitt, ið vit hava givið teimum, tí tað skal heldur ikki vera ov nógv. Okkurt fara vit tó at ganga ígjøgnum aftrat í seinastu venjingunum, tá ið vit eru komin upp á pláss.
Ingi Olsen og Mark Lausen-Marcher deila fyrireikandi arbeiðið ímillum sín soleiðis, at Ingi tekur sær av verjupartinum og Mark av álopspartinum.
– Tíbetur hava vit havt atgongd til dystir á netinum, so vit hava vitað nokk so væl, hvat okkara mótstøðulið eru komin við, og so er eisini hesaferð. Mark er óførur at sita við telduna og klippa dystirnar, og tað er ein øgilig ferð á, tá ið hann spolar dystirnar ígjøgnum, greiðir Ingi frá.
– Nú siti eg í mínum dagliga arbeiði heldur ikki so nógv við telduna, so tað er heldur eingin orsøk til, at báðir brúka orku upp á tað sama, so mannagongdin er tann, at Mark finnur brotini, klippir tey saman og sendir mær tey síðani. So gjøgnumganga vit alt í felag og royna at fyrireika spælararnar sum best út frá tí vitan, vit hava fingið.

Einki fjáltur á liðnum

Tað er eingin loyna, at Ukraina er eitt land í serstøðu, nú russiski herurin dubbar seg við eystara markið, men Lviv liggur heilt har vesturi í landinum

og langt burtur frá tí møguliga frontinum, ið skuldi verið, so tí er tað ikki ein serliga nervøsur H71-hópur, ið er farin avstað.
– Tað av spenningi, ið vit uppliva, er tað vanliga í sambandi við dystir. Tá ið lutakastið hevði verið og samráðast skuldi um dystirnar, var kanska eitt sindur av nervøsiteti, men tá ið tað gjørdist greitt, at vit skuldu spæla annan dystin úti og hin heima, var tað skjótt, at øll høvdu forlíkað seg við tað, sigur Ingi.
– Vit hava hvørki hoyrt ella merkt nakað, so eg haldi bara, at allar eru spentar, sum tær altíð eru undan dysti, og einki meira enn tað. Nógv er sjálvandi at hoyra í tíðindunum og síggja á netinum um støðuna, men tað hava vit ongan møguleika at gera nakað við ella at brúka til nakað, so eg kann ikki siga, at tað upp á nakran máta órógvar okkum ella okkara fyrireikingar.
Tá er Ingi Olsen nógv meira upptikin av tí sannroynd, at fyrri dysturin er á útivølli og tí helst kann væntast at vera torførari enn dysturin á heimavølli.
– Onkursvegna føli eg tað, sum endurtaki eg meg sjálvan, men eg havi altso aftur hesaferð eina góða kenslu av, at vit saktans kunnu gera ein vørr. Út frá tí, sum eg havi sæð til Galychanka, havi eg einki sæð, ið ræðir meg, tí har er ikki nakar spælari á liðnum, sum ikki passar til okkum, sigur hann.
– Vit kenna jú okkara spælarar og vita, at tær eru ógvuliga stinnar, so tað er ikki so nógv at stúra fyri, haldi eg. Galychanka hevur gjøgnumbrotsspælarar í høgru síðu og skjúttar í vinstru, og tað er ikki øðrvísi, enn fleiri av hinum liðunum í heimligu kappingini hava, og tá plaga vit at standa okkum væl. Spæla vit konsentrerað, sum vit hava gjørt higartil, havi eg minst líka góðar vónir hesaferð.

(Mynd: Álvur Haraldsen)

BANKNORDIK

Vinn eina persónliga venjing
- fyri teg og ein vin

Lær at finta sum

Elias á Skipagøtu

Hitt A-landsliðið

Eftir venjingina sleppa tit at heilsa uppá føroyska A-landsliðið hjá monnum og fáa eisini atgongumerki til landsdystirnar í januar 2022.

Soleiðis gert tú

Tú kanst antin gera ein stuttan film, har tú fortelur, hví tú ynskir at vinna, ella gera tað skrivliga.

Les meira og send inn á
banknordik.fo/hondboltur

Meira enn ein banki

Vit raka málið!

Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!
MBM

1	Rúna Jógvansdóttir Larsen
2	Elsa Egholm
5	Vár Bentsdóttir Zachariasen
6	Bjørk Brimnes
7	Maria Halsdóttir Weyhe
8	Karina Eysturtún Rubeksen
9	Brynhild Pálsdóttir
10	Eva Barba Arge
12	Alda av Skarði
14	Inga Maria Joensen
17	Lív Bentsdóttir Zachariasen
18	Rannvá Olsen
25	Sára Jacobsen
28	Lukka Arge
77	Jana Mittún
99	Guðrið á Borg

Venjari:	Mark Marcher Lausen
Venjari:	Ingi Olsen
Liðleiðari:	Sunniva Bogadóttir
Málmansvenjari:	Jóhan Hofgaard
Fysiskur venjari:	Heri Ziska
Fysioterapeut:	Ári Jógvansson Olsen

sms

SMS KAPPINGIN - KVINNUR

Nr.:	Lið:	Dystir	V.M	T.M	Munur	Stig
1.	Kyndil	13	384	286	98	21
2.	**H71**	**11**	**338**	**263**	**75**	**21**
3.	Stjørnan	14	427	328	99	18
4.	Neistin	13	333	297	36	16
5.	Stíf	15	354	355	-1	10
6.	VB	14	297	419	-122	4
7.	EB	12	217	402	-185	2

1	Ári Egason Dam
2	Sveinur Olafsson
5	Pauli Mittún
8	Pætur Thomsen
9	Jón Rói Mohr Høgnesen
10	Djóni Gaard Joensen
11	Hans Kári Hansen
16	Pauli Jacobsen
18	Sakir T. Frýdal
23	Emil Svoldgaard
24	Niklas H. Højgaard
26	Janus Dam Djurhuus
28	Rói Ellefsen á Skipagøtu
30	Poul Símun í Garði
39	Rókur Ziskason
45	Peter Krogh

Venjari:	Simon Olsen
Venjari:	Petur Mittún
Málmansvenjari:	Jens á Skipagøtu
Fysiskur venjari:	Heri Ziska
Fysioterapeut:	Ári Jógvansson Olsen
Liðleiðari:	Petur O.Sivertsen

BURN
FITNESS

BURN KAPPINGIN - MENN

Nr.:	Lið:	Dystir	V.M	T.M	Munur	Stig
1.	**H71**	**14**	**443**	**329**	**114**	**24**
2.	Kíf	13	358	326	32	20
3.	Víf	14	395	371	24	14
4.	Stíf	14	384	442	-58	11
5.	Team Kl.	13	356	386	-30	9
6.	Neistin	12	338	350	-12	8
7.	Kyndil	14	334	404	-70	8

ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
Flytur teg frameftir.

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
www.bilasolan.fo

Bilasølan
Vegurin Langi 43, 359700

NORÐOYA SPARIKASSI

Lán til bústaðin

Tosa við okkum um fígging

Heimlán
Bústaðarlán
Realkredittlán
Byggikreditt
Orkulán

Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 475000 ns@ns.fo ns.fo

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«

ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN

FAROE SHIP

SÚKKLA FYRI EUROPA CUP

2021/2022

HILMAR JAN HANSEN

Millum 20 og 25 fólk fara næsta sunnudag at súkkla í ein tíma hvør fyri at útvega pengar til europeiska ævintýrið hjá H71-kvinnunum. Ætlanin er, at hetta skal vera eitt afturvendandi tiltak í sambandið við europeisku kappingarnar hjá felagnum

Hugskotið, at fáa nøkur fólk at súkkla og so at fáa fólk at tekna seg fyri so og so nógvum stuðli fyri hvønn súkklaðan kilometur, er ikki ókent, og eisini kenna vit til stuðulsrenning, stuðulssvimjing og onnur líknandi tiltøk. Akkurát hetta við súkklingini hevur H71 funnið sær íblástur til frá danska hondbóltsfelagnum, Skjern Håndbold, sum hevur havt slíka stuðulssúkkling í eini 12 ár.

– Tankin er, at hetta skal vera afturvendandi tiltak, ið skal stuðla europeiska hondbóltinum hjá H71, og hóast vit í ár ikki fara at hava hesa súkklingina fyrr enn til seinnu fjórðingsfinaluna hjá kvinnunum, er ætlanin at hava hetta tey komandi árini í sambandi við fyrstu dystirnar hjá kvinnum og monnum – um liðini væl at merkja megna at vinna sær rætt til europeiskan hondbólt.

Tað sigur Petur Mittún, ið saman við Petur Even Djurhuus, Hendrik Egholm, Halli Danielsen, René Dahl Olesen og Christian Nagata hevur arbeitt við hugskotinum, so tað ein form og eitt innihald, ið minnir nógv um tað, ið gjørt verður í Skjern Håndbold.

– Hugskotið gongur út uppá, at vit fáa nøkur fólk at súkkla í ein tíma, og so skulu tey fara út at finna sær stuðlar, ið vilja rinda eina upphædd fyri hvønn kilometur, tey súkkla. Vit hava fingið bæði menn og kvinnur at súkkla, og nú tað eru kvinnurnar, ið eru komnar so langt, halda vit tað vera serliga stuttligt at fáa fleiri kvinnur við hesaferð, sigur Petur.

– Málið var at fáa millum 20 og 25 súkklarar, og vit hava nú 21, ið eru klár at seta seg á súkkluna fyri at vinna H71 nakað av pengum til europeisku luttøkuna. Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu fólk finna sær stuðlar,

men her eru nøkur, ið fara eftir fyritøkum, onnur eftir privatpersónum, og so uppaftur onnur, ið kanska royna at finna stuðlar millum bæði fyritøkur og privatpersónar. Og so ber sjálvandi eisini til hjá øllum at halda seg framat, ið fegin vilja stuðla!

Ger eitt sindur burturúr

Sjálvt tiltakið verður næsta sunnudag, tá ið H71 hevur heimadyst ímóti HC Galychanka Lviv, og fer sjálv súkklingin fram á motiónssúkklum í Burn í miðbýnum.

– Súkklararnir møta í Burn klokkan 15.30, har tey gera klárt, stilla súkklurnar inn og hvat tey nú einaferð skulu gera áðrenn, og so hava tey eina súkklu í part frá klokkan 16 til 17, tá ið kilometrarnir telja, greiðir Petur frá.

– Allir súkklararnir fáa eina spælaratroyggju við nummari og teirra egna navni, sum teir súkkla í og síðani sleppa at eiga aftaná. Tá ið liðugt er, fara tey at hugna sær eina løtu, áðrenn farið verður í Geisa, har H71 bjóðar ein góðan bita. Síðani verða súkklararnir avheintaðir í bussi klokkan 19.30 og koyrdir niðan í ítróttarhøllina á Hálsi at hyggja at, tá ið fjórðingsfinalan hjá H71-kvinnunum er.

Tað eru tó ikki bara súkklararnir, ið fáa eitt serligt upplivilsi burtur úr degnum, tí millum øll tey, sum stuðla tiltakinum "Súkkla fyri Europa Cup", verður drigið um eina ferð fyri tvey til útidystin í hálvfinaluni hjá kvinnunum.

– Vit vita væl, at dystirnir í fjórðingsfinaluni skulu spælast fyrst og samanlagt vinnast, men vit hava valt at síggja tað frá tí ljósu síðuni, og tí leggja vit út við hesum góða vinninginum, sigur Petur við einum lítlum skálkabrosi.

– Lat meg siga tað soleiðis, at skuldi so tað óvæntaða hent, at H71-kvinnurnar ikki koma í hálvfinaluna, verður vinningurin í staðin ein hugnaligur túrur á Hotel Brandan, har døgurði, gisting og morgunmatur fyri tvey er á skránni. Óansæð, so vóna vit, at ein góður vinningur kanska lokkar enn fleiri at stuðla.

(Mynd: BURN)

Stuðulssúkklingin "Súkkla fyri Europa Cup" verður í Burn næsta sunnudag, og øll eru vælkomin at stuðla, umframt at lutakast verður millum allar stuðlarnar um eina ferð fyri tvey

VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til *HITA*
SANITET &
VENTILATIÓN

Maria Poulsen & Co

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000

HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

Mynd: Gudmund Helmsdal

LAIDERZ

Fokus på sportsfaciliteter

HOYVIKSVØLLURIN

Fyrsti FIFA QUALETY PRO
góðkendur vøllur í Føroyum.

JUTA MASTER 40/200 á EL25

www.laiderz.dk

ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!

J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399

Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310
@theathletesfoottorshavn

HILMAR JAN HANSEN

HUGBURÐURIN ALT AT SIGA

(Mynd: Hilmar Jan Hansen)

Simon Olsen hugsar ikki so nógv um, um steypafinalan skal verða ímóti KÍF ella Neistanum, men hevur bara í huganum, at arbeiðið hjá H71 er ikki liðugt, fyrr enn finalusessurin er tryggjaður eftir dystin ímóti VÍF sunnudagin

Hóast menninir vunnu fyrru hálvfinaluna ímóti VÍF sera sannførandi við níggju málum, so vil H71-venjarin, Simon Olsen, ikki hava tað at verða ein kodda. – Vit skulu spæla henda seinna dystin upp á sama máta sum tann fyrra, og vit fara sjálvandi eftir at vinna, sigur hann.

Sunnudagin spæla H71-menninir seinnu hálvfinaluna í Faxe Kondi-steypakappingini ímóti VÍF, og verður dysturin hesaferð í Hoyvíkshøllini. Í fyrru hálvfinaluni í Vestmanna gjørdu okkara menn bart og vunnu ein sera sannførandi sigur við níggju málum, sum merkir, at støðan valla fær verið stórt betri.

– Í fyrra dystinum fingu vit eina góða útgangsstøðu, men nú ræður um hjá okkum at fáa fatur í rætta endanum beinanvegin, so vit eru uppsettir og taka henda dystin upp á sama máta. Vit skulu spæla fyri at vinna, sigur Simon Olsen, mansvenjari hjá H71.

– Tú kanst siga, at okkara ringasta mótstøða eru kanska vit sjálvir, so tí

hevur okkara hugburður til dystin alt at siga. Koma vit við tí konsentratión og tí orku, sum hópurin hjá okkum kann geva, eiga vit at vinna samanlagt og spæla okkum í finaluna. Men tað snýr seg øgiliga nógv um, hvussu okkara avrik er, so tí ræður um at fara heilhjartaður inn til dystin fyri at vinna hann.

Um fyrra dystin kann í stuttum sigast, at H71 fór framum, tá ið tíggju minuttir vóru farnir, og síðani øktist leiðslan stútt og støðugt ígjøgnum dystin. Í hálvleikinum vóru fýra mál á muni, 16-12 til H71, og serliga ímóti endanum gjørdu okkara menn ein vørr og vunnu ta síðstu drúgvu løtuna 8-3, so úrslitið gjørdist 33-24 til H71.

– Nú er tað so upp til okkum at gera arbeiðið liðugt, so vit koma í finaluna, sigur Simon Olsen, ið ikki hugsar so nógv um, um mótstøðuliðið verður KÍF ella Neistin, ið spældu eina sera javna fyrru hálvfinalu í Havn, har bara eittans mál var á muni.

– Nei, eg gangi ikki so høgt uppí, um tað verður annað liðið ella hitt, ið vit skulu møta, um vit koma í finaluna, tí bæði KÍF og Neistin eru góð lið. Eg síggi heldur soleiðis upp á tað, at eru vit nóg dugnaligir til at koma í finaluna, so taka vit tað liðið, vit fáa, og so fyrireika vit okkum eftir tí.

(Mynd: Jan Sørensen)

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Frítíðin byrjar umborð

Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

HILMAR JAN HANSEN

KOMMUNAN STUÐLAR KVINNUNUM

(Mynd: Hilmar Jan Hansen)

Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini og varaborgarstjóri, er her avmyndaður saman við Heðin Mortensen, borgarstjóra, uttan fyri býráðshúsið á Vaglinum.

Mentamálanevndin hjá Tórshavnar býráð hevur játtað H71 75.000 krónur til luttøkuna í EHF Europa Cup-kappingini. – Avrikið hjá kvinnunum er ein sólskinssøga, ið vit eiga at stuðla, sigur Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini.

Ikki eru tað teir stóru pengarnir hjá einum føroyskum hondbóltsfelag at heinta, tá ið spælast skulu europeiskir dystir. Frá europeisku hondbóltssamgonguni, EHF, eru 20.000 krónur av stuðli at fáa til hvørt umfar – og tá fekst einki fyri fyrsta umfarið. Heldur ikki er stuðulin líka góður til kvinnulið sum til manslið, so luttøkan fær illa verið annað enn ein fíggjarlig byrða hjá tí felag, sum roynir seg.
Útreiðslurnar hjá H71, nú liðið er komið í fjórðingsfinaluna, fara í øllum førum upp um eina hálva millión krónur, og tí valdi felagið at senda bæði Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðnum umsókn um stuðul, nú talan er um eitt heilt serligt undantak frá vanligu støðuni.
Fyri tað fyrsta er tað eitt stórt stig at taka, at fara úr í Europa at kappast, og hartil var tað eingin, ið frammanundan visti ella væntaði, at tað skuldi ganga so væl hjá H71-kvinnunum, at tær enn eru í kappingini, nú fjórðingsfinalurnar eru á skránni.
Enn er einki svar komið frá Mentamálaráðnum, men gleðin var hin-

vegin stór í Hoyvík, tá ið svarið kom frá mentamálanevndini í Tórshavnar býráð, tí svarið var ein játtan upp á 75.000 krónur, ið veruliga er ein munagóð hjálpandi hond, nú H71 umboðar bæði høvuðsstaðin og landið alt úti í Europa.

– Vit valdu at víkja frá øllum mannagongdum og at lata ein munagóðan stuðul, tí hetta er altso nakað heilt serligt, sigur Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini.

– Vanliga stuðla vit ikki ítróttarfeløgini við øðrum enn smærri, symbolskum upphæddum, men av tí at europeiska luttøkan hjá H71 hevur verið ein so stór sólskinssøga, helt eg, at hetta áttu vit at stuðla. Tað er í allar mátar serstakt, at eitt føroyskt lið er komið so langt, og ikki minst er tað merkisvert, at talan er um bæði eitt ungt lið og eitt nýtt felag í europeiskum høpi.

Eiga at stuðla

Í mentamálanevndini eru fimm limir úr fýra ymiskum flokkum, har Annfinn Brekkstein sum sagt er formaður og hinir nevndarlimirnir eru Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Annika Olsen og Ruth Vang. Tað var ein samd mentamálanevnd, ið samtykti at veita H71 henda serliga stuðulin.

– Eg vildi fegin hava, at mentamálanevndin stóð saman um hetta, og tað stóð ikki á. Nú eru so nógvar umstøður, ið gera seg galdandi, so sum korona og annað, at vit saktans kundu stuðla H71-kvinnunum fyri teirra ídni og framburð, tí hetta hevur nógv at siga fyri føroyskan hondbólt yvirhøvur og at tað er eitt kvinnulið, ið soleiðis hevur brotið ígjøgnum, sigur Annfinn.

– Tað er heilt serstakt, at eitt kvinnulið er komið so langt, so vit kunnu ikki annað enn ásanna, at her er gott arbeiði gjørt, bæði av felagnum og av kvinnunum. Vit hava upp ígjøgnum árini sæð, at tað altíð er okkurt felag, ið skarar framúr sum drívmegi, og líka sum vit fyrr hava sæð bæði Kyndil og VÍF gingið undan í europeiskum høpi, er tað nú H71, ið ger ein vørr. Tað eiga vit at stuðla, nú umstøðurnar eru so serligar, sum tær eru.

Annfinn Brekkstein sigur, at tað eisini passar væl til profilin hjá Tórshavnar kommunu við nógvum sjálvbodnum barna- og ungdómsarbeiði, ið ikki bara gagnar teimum, sum íðka, men samfelagnum sum heild.

– Eg havi ta áskoðan, at ítrótturin er til gagns fyri børn og ung, samstundis sum hann er við til at halda alt tað burtur, ið vit ikki brýggja okkum um, at okkara børn og ungu koma útí. Eisini verða vit róst aðrastaðni fyri alt tað virksemi, sum er í okkara høvuðsstaði, tí tað er við til at gera, at kriminaliteturin er so lítil, sum hann er. Har vit kunnu, eiga vit tí sjálvsagt at skapa bestu fortreytir og møguleikar, sigur formaðurin í mentamálanevndini at enda.

DESIGNA KØKAR **BORG** | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO

FISHFACTS

www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD

RAISED IN THE WILD

hiddenfjord.com

SISU
SKORA
VIÐ
SISU

Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Fríggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt

OKKARA KJARNUØKI

GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD

Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.

januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

Tak appina niður her

Fyll á og koyr víðari

effo appin

REINAR TENN BRENNA IKKI



ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo